ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

23. oktober 2013
Mál: 13/00537-32

**Løgtingið**

**Løgtingsmál nr. 37/2013: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnavernd (reglur um Barnahús v.m.)**

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnavernd**

(reglur um Barnahús v.m.)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 104 frá 24. oktober 2012, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Aftaná § 10 verður sett:
”**§ 10a.** Barnahúsið virkar sum karmur um tvørfakligt samstarv, tá børn undir 18 ár hava verið fyri kynsligum ágangi ella likamligum harðskapi, ella tá illgruni er um, at hesi eru ella hava verið fyri kynsligum ágangi ella likamligum harðskapi.
*Stk. 2.* Løgregla, ákæruvald, sosialir myndugleikar, heilsumyndugleikar, løggild heilsustarvsfólk og starvsfólk í Barnahúsinum kunnu í sambandi við málsviðgerð sbrt. stk. 1 lata upplýsingar um privat viðurskifti hjá barninum og familjuni ímillum sín, tá umhugsni fyri viðurskiftum barnsins fer fram um fyrilitið fyri teimum áhugamálum, ið geva grund fyri dyljan.”

2) Í § 14, stk. 5 verður sum 2. og 3. pkt sett:
“Um ikki serlig viðurskifti tala ímóti hesum, skal barnaverndartænastan boða fráboðara sbrt. stk. 1 frá, hvørt fráboðanin hevur ført til, at málið verður kannað, ella at fyriskipanir eru settar í verk sambært hesi lóg. Afturboðanin fevnir bert um tann, ið fráboðað er um.”

3) Í § 14, verður sum stk. 6 sett:
“*Stk. 6.* Um ikki serlig viðurskifti tala ímóti hesum, kann barnaverndartænastan, tá tað hevur avgerandi týdning fyri, hvørja hjálp og

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304000 • Fax: +298 304045 • E-mail: amr@amr.fo

stuðul fráboðari sbrt. stk. 1 kann veita barninum, kunna um, hvørjar fyriskipanir eru settar í verk.”

4) § 18, stk. 1 verður orðað soleiðis:
”Í teimum førum, har orsøk er at halda, at eitt barn hevur eina lívshóttandi ella álvarsama sjúku ella skaða, er fyri kynsligum ágangi ella likamligum harðskapi, og um tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, og barnið, ið hevur fylt 15 ár, ikki geva samtykki til, at barnið kemur til kanningar ella viðgerð, kann barnaverndarnevndin uttan rættarúrskurð avgera, at barnið skal til hóskandi viðgerð ella kanning, undir hesum viðgerð og kanning, ið Barnahúsið fyriskipar.”

5) § 45, stk. 8 verður orðað soleiðis:
“*Stk. 8.* Barnaverndarumsitingin skal tosa við barnið í tann mun, barnsins búning og umstøðurnar í málinum ikki tala ímóti hesum. Kann barnaverndarumsitingin ikki tosa við barnið, eigur barnaverndarumsitingin á annan hátt at fáa lýst sjónarmið barnsins. Í tann mun, atlitið til barnið talar fyri hesum, kann barnaverndarumsitingin tosa við barnið uttan samtykki frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan, og uttan at hesi eru hjástødd. Barnið eigur í hesum førum at hava hjásitara.”

6) Aftaná § 45 verður sett:
”**§ 45a.** Tá barnaverndartænastan fær fráboðanir sbrt. § 14 um barn, ið er undir fyriskipan sambært hesi lóg, skal barnaverndarumsitingin meta um málið av nýggjum. Í sambandi við eftirmetingina av málinum skulu onnur, ið gera uppgávur fyri barnaverndartænastuna, men sum ikki hava verið partur av málsviðgerðini áður, í størst møguligan mun, vera við til at endurskoða málið.

7) Í § 49, stk. 1 verður eftir ”kanningar” sett: ”, tó skal barnaverndartænastan beinanvegin og innan 24 tímar eftir eina fráboðan meta um, hvørt vandi er fyri barnsins heilsu og menning, og um bráðfeingis fyriskipan tí skal setast í verk”.

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2014.

**Kap. 1. Almennar viðmerkingar**

Yvirskipaða endamálið við lógaruppskotinum er at tryggja, at børn í størri mun verða vard móti kynsligum ágangi og likamligum harðskapi.

Lógaruppskotið ásetir, at Barnahús skal virka sum karmur um tvørfakligt samstarv millum barnaverndartænastur, løgreglu og heilsumyndugleikar í málum um kynsligan ágang og likamligan harðskap. Harumframt er Barnahúsið eitt fysiskt stað, har barnið og familjan í tryggum og barnavinaligum umhvørvi kunnu koma at fáa hjálp og stuðul, og har avhoyringar verða framdar. Harumframt samskipar Barnahúsið læknaligu kanningarnar í málum um kynsligan ágang og likamligan harðskap.

Hugsanin við Barnahúsinum er, at myndugleikarnir koma til barnið, heldur enn at barnið ferðast ímillum ymsu myndugleikarnar.

Barnahúsið er karmur um tvørfakligt samstarv millum ávísar myndugleikar. Sambært § 10, stk 1 í barnaverndarlógini er ásett, at barnaverndartænastan skal samstarva við onnur barnaverndarøki og myndugleikar, tá ið barnaverndartænastan metir hetta vera eina hjálp til at loysa uppgávur sambært barnaverndarlógini.

Tvørfakligt samstarv er sostatt longu ásett í barnaverndarlógini.Tó skal heimild ásetast í lóg at lata upplýsingar um privat viðurskifti ímillum myndugleikar.

Lógaruppskotið ásetir tí neyðugu reglurnar fyri, at myndugleikar kunnu samstarva og lata upplýsingar í Barnahúsinum í málum um kynsligan ágang og likamligan harðskap. Harumframt hevur lógaruppskotið einstakar tillagingar í mun til málsviðgerðina hjá barnaverndartænastunum, ið hava til endamáls at fyribyrgja eitt nú, at børn eru fyri ágangi og harðskapi.

Kynsligur ágangur hevur fylt nógv í almenna rúminum seinastu tíðina, eins og hetta álvarsliga evnið hevur fingið rúm á politiska pallinum.

Felagsskapir, bólkar og einstaklingar hava skipað fyri ráðstevnum, mótmælisgongu, skipað facebookbólkar og annað. Landsstýrið ásetti í samgonguskjalinum, at heildarætlanin um harðskap í parlagi og nærsambondum skuldi víðkast til eisini at fevna um kynsligan ágang. Løgtingið hevur álagt landsstýrinum at gera nýggja heildarætlan um kynsligan ágang, og hevur Løgtingið sett pening av til at skipa Barnahúsið. Eisini verða broytingar gjørdar í føroysku rættargangslógini.

Lógaruppskotið skal síggjast sum ein liður í at áseta neyðugu karmarnar fyri, at vit í Føroyum fáa fyribyrgt og viðgjørt mál um kynsligan ágang og likamligan harðskap á haldgóðum grundarlagi.

## Kap. 2. Avleiðingar av uppskotinum

### Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið hevur ikki beinleiðis fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar. Barnahúsið eigur ikki at føra til aðrar uppgávur enn tær, kommunurnar longu hava á barnaverndarøkinum í dag. Tó kann skipanin við Barnahúsi hava óbeinleiðis fíggjarligar avleiðingar fyri kommununa, tí at royndirnar frá eitt nú Íslandi hava víst, at talið av málum í Barnahúsinum hava verið alsamt vaksandi, síðan Barnahús varð skipað.

At veita sálarfrøðiliga viðgerð til børn, ið hava verið fyri kynsligum ágangi og likamligum harðskapi eru útreiðslur, sum kommunurnar hava í dag.

Sambært heildarætlanini um harðskap í parlagi og nærsambondum skal viðgerðartilboð skipast til børn, ið hava verið fyri harðskapi, undir hesum kynsligum ágangi. Peningur er settur av til endamálið í heildarætlanini. Við tað, at kreppuhjálp vil vera ein natúrligur partur av virkseminum í Barnahúsinum, verður mett, at ætlanin við Barnahúsi og átaki um viðgerðartilboð í heildarætlanini natúrliga kunnu samskipast.

Løgtingið hevur sett 500.000 kr. av til at skipa Barnahúsið. Við teimum 10-15 málunum, ið hava verið seinastu árini, átti hesin peningur at rokkið til stovningarútreiðslur í inniverandi ári og til rakstrarútreiðslur eftirfylgjandi ár. Mett verður at virksemið í Barnahúsinum kann haldast innan ásetta fíggjarliga karmin.

### Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið hevur smærri umsitingarligar avleiðingar fyri barnaverndartænasturnar. Harumframt hevur uppskotið jaligar umsitingarligar avleiðingar í mun til samstarvið millum myndugleikar, við tað at uppskotið heimilar, at upplýsingar verða latnar millum myndugleikar í Barnahúsinum.

### Avleiðingar fyri vinnuna

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna.

### Avleiðingar fyri umhvørvið

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

### Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### Sosialar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

### Avleiðingar fyri millumtjóða sáttmálar

Mett verður, at uppskotið hevur ikki við sær umsitingarligar avleiðingar fyri millumtjóða sáttmálar ella er í ósamsvari við millumtjóða sáttmálar. Uppskotið er hinvegin við til at styrkja rættindi barnanna sambært barnarættindasáttmálanum í mun til umsorgan og verju,

eins og vit fáa betri hagtalsgrundarlag í mun til mál um kynsligan ágang og likamligan harðskap.

Talva: Yvirlit yvir avleiðingar

| | Fyri landið/lands-myndugleikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar sam-felagsbólkar/ /felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | | Ja | |

**Ummæli**

Uppskotið er sent til ummælis hjá Mentamálaráðnum, Heilsumálaráðnum og Fíggjarmálaráðnum, við áheitan um at senda uppskotið til undirliggjandi stovnar Føroya Kommunufelag, Kommunusamskipan Føroya, Barnaverndarstovu Føroya, Fosturforeldrafelagnum, Almannaverkinum, Ríkisumboðnum, Sosialráðgevarafelag Føroya, Føroya Pedagogfelag, Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, Føroya Lærarafelag, Felagnum Føroyskir Sálarfrøðingar, Gigna og Føroya Landfúta

Ummæli er komið frá Heilsumálaráðnum, Gigna, Mentamálaráðnum, Sernámi, Fíggjarmálaráðnum, Føroya kommunufelagi, Kommunusamskipan Føroya, Barnaverndarstovu Føroya, Almannaverkinum, Føroya Pedagogfelagi og Føroya Landfúta.

Viðmerkingar og spurningar eru í høvuðsheitum í mun til orðingar í viðmerkingunum til uppskotið. Ávísar orðingar eru tískil tillagaðar.

Almannaverkið og Føroya Pedagogfelag meta, at Barnahúsið eisini eigur at fevna um sálarligan harðskap.

Í tann mun, at løgregla og heilsustarvsfólk ikki hava nakran leiklut í málinum, er einki at samstarva um, og sostatt einki endamál at taka upp samstarv við Barnahúsið. Sálarligur harðskapur er vanligur partur í barnaverndarmálum, ið barnaverndartænasturnar taka sær av.

Kommunusamskipan Føroya og Føroya Barnaverndarstova taka ikki undir við broytingunum í § 45a. Vanlig mannagongd hjá barnaverndartænastunum er at tá ein nýggj fráboðan kemur inn til barnaverndartænastuna, so plagar barnaverndartænastan at kanna viðurskiftini, herundir at innheinta upplýsingar, ella í minsta lagi tosa við fakfólk rundan um barnið. Tað kann ikki vera rætt, at barnaverndartænstan uttan nakað skal meta um málið av nýggjum. Mælt verður til at broyta orðingina nakað soleiðis, at tað er bert, tá talan er um álvarsamar og avgerandi nýggjar upplýsingar, sum umsiting ikki kann síggja burtur frá, at málið skal metast av nýggjum.

Føroya kommunuskipan vísir á, at skyldan, ið verður áløgd barnavendartænastunum er alt ov umfatandi í mun til fleiri av barnaverndartænastunum. Hesar eru ikki nóg stórar til at hava onnur og óheft starvsfólk til at eftirkanna slík mál av nýggjum. Skal tænastan keypast, verður eisini dýrt fyri einstøku tænasturnar. Serliga er ringt at góðtaka hesa skyldu so treytaleyst, sum uppskotið til § 45a er orðað, tí skyldan er galdandi uttan mun til, um fráboðanin inniheldur nýggjar og týðandi upplýsingar ella ikki.
Ein meting er nú sett inn í lógartekstin. Í sambandi við eftirmetingina av málinum skulu onnur, ið gera uppgávur fyri barnaverndartænastuna, men sum ikki hava verið partur av málsviðgerðini áður, í størst møguligan mun, vera við til at endurskoða málið.

Barnaverndarstova Føroya ivast, hvørt upphæddin, ið er avsett til at skipa Barnahús, er nøktandi, og mælir til, at 1 mió. kr. verða settar av til endamálið. Føroya Kommunufelag ivast eisini, hvørt upphæddin er nøktandi, og mælir til, at avtalan um Barnahús verður endurskoðað eftir einum ári fyri at meta um, hvørt peningurin, ið er avsettur, røkkur til endamálið. Í mun til fakligar viðmerkingar vísir Føroya Kommunufelag til hoyringssvarið frá Barnaverndarstovu Føroya.

Kommunusamskipan Føroya metir, at fíggjarligu útgreiningarnar og fíggjarliga uppgávubýtið í síni heild er ov illa lýst í uppskotinum. Eisini vísir Kommunusamskipan Føroya á, at tað ikki er dugur í nøkrum freistum, um barnaverndartænasturnar ikki fáa handlað, tí bíðað verður eftir øðrum myndugleikum. Neyðugt er, at øll skipanin gerst smidligari, ikki bara Barnavendartænastan.

Fígging og uppgávubýti verður nærri skipað sambært avtalu millum partarnar og, má innihaldið og virksemið sostatt skipast í mun til fíggjarligu karmarnar.

## Kap. 3. Serligar viðmerkingar

### *Til § 1, nr. 1*

Barnahúsið verður formliga skipað við avtalu millum avvarðandi myndugleikar. Virksemið í Barnahúsinum verður skipað við samstarvsavtalum millum Barnahúsið, barnaverndartænastur, løgreglu og heilsumyndugleikar.

Málbólkurin hjá Barnahúsinum eru børn undir 18 ár, ið hava verið fyri kynsligum ágangi ella likamligum harðskapi, ella har illgruni er um kynsligan ágang ella likamligan harðskap.

Eisini nærmastu umsorganarpersónar barnsins eru fevnd av málbólkinum. Tað hevur onga ávirkan, um ágangurin er framdur nýliga ella fyri tíð síðan.

Barnahúsið fevnir t.d. ikki um mál um harðskap millum javnaldrandi í náttarlívinum.

Virksemið í Barnahúsinum fevnir um at kanna, um barn hevur verið fyri ágangi, eitt nú við samrøðum. Eisini fevnir virksemi í Barnahúsinum um videoavhoyringar hjá løgregluni og at veita barninum og familjuni kreppuhjálp og ráðgeving í mun til málsgongd o.a. Harumframt er ætlanin, at Barnahúsið samskipar neyðugu læknakanningarnar í mun til barnið.

Í sambandi við mál um kynsligan ágang og likamligan harðskap skal barnaverndarumsitingin kanna umstøður barnsins sambært § 45 í barnaverndarlógini, og er tað sum liður í § 45 kanningini, at samstarv verður tikið upp við Barnahúsið.

Upplýsingar, ið koma fram í sambandi við kanningar á Barnahúsinum, eru partur av samlaðu § 45 kanningini hjá barnaverndarumsitingini, og upplýsingarnar kunnu leggjast til grund fyri ætlan sbrt. § 47 í barnaverndarlógini. Tað eru barnaverndarnevndirnar, ið taka avgerð um, hvørjar fyriskipanir eiga at verða settar í verk í mun til barn, ið hevur verið fyri kynsligum ágangi ella likamligum harðskapi, eins og tað er barnaverndarumsitingin, ið hevur myndugleikaábyrgdina í teimum málum, ið verða víst til Barnahúsið. Løgregla og heilsuverk hava tó myndugleikaábyrgdina í mun til teirra myndugleikauppgávur í Barnahúsinum.

Teir myndugleikar, ið samstarva í Barnahúsinum eru ikki undir leiðslu í Barnahúsinum, men eru undir egnari myndugleikaleiðslu. Barnahúsið kann veita barnaverndarumsitingini ráðgeving og vegleiðing í mun til innleiðandi kanningarnar í einum máli, eins og Barnahúsið kann veita ráðgeving og vegleiðing í málum, har veikur illgruni er um, at barn hevur verið fyri kynsligum ágangi ella likamligum harðskapi, og ivi tí er um, hvørt málið eigur at vísast til Barnahúsið.

Tá illgruni er um, at barn er fyri kynsligum ágangi ella likamligum harðskapi, og kanningarnar í málinum ikki kunnu prógva ágangin, skal Barnahúsið hóast hetta veita barninum og familjuni neyðuga kreppuhjálp og vegleiðing. Hjálpin í Barnahúsinum er sostatt ikki treytað av, at kynsligi ágangurin ella harðskapurin kann prógvast ella føra til, at dómur kann fellast í málinum.

Starvsfólk frá barnaverndarumsitingini kemur við barninum og/ella familjuni til kanningar á Barnahúsinum, og er starvsfólkið í barnaverndarumsitingini at meta sum partur av starvsfólkahópinum í Barnahúsinum.

§ 10a, stk. 2 veitir heimild fyri, at løgregla, heilsustarvsfólk, barnaverndarumsiting og starvsfólk í Barnahúsinum kunnu lata upplýsingar um privat viðurskifti ímillum sín í málum um kynsligan ágang og likamligan harðskap, tá ið endamálið við at lata upplýsingar er at fyribyrgja ella steðga ágangi mótvegis barninum. Heimildin at lata upplýsingar røkkur ikki longri enn til viðkomandi persónar, ið røkja myndugleikauppgávur í sambandi við mál um kynsligan ágang og likamligan harðskap.

Tað kann í høvuðsheitum vera serliga viðkomandi, at myndugleikar lata upplýsingar ímillum sín í byrjanini av einum máli, tá grundarlagið at meta um málið er heldur tunt. Upplýsingar kunnu sostatt latast millum myndugleikar, áðrenn mál verður víst til Barnahúsið, eins og

upplýsingar kunnu latast undir viðgerð í Barnahúsinum og eftir, at mál er liðugt viðgjørt í Barnahúsinum. Atlitið til barnið skal tala fyri at lata upplýsingar.

Harumframt kunnu myndugleikar lata upplýsingar í einum máli, tá hetta hevur til endamáls at deila royndir og at styrkja felags vitanargrundarlagið millum myndugleikar í málum um kynsligan ágang og likamligan harðskap.

Tær upplýsingar, ið kunnu latast, eru upplýsingar av privatum slagi, ið viðvíkja umstøðum barnsins ella umstøðum familjunnar. Privatar upplýsingar fevna eisini um heilsustøðu og um sosialar trupulleikar.

Upplýsingar kunnu latast um støðu barnsins, sálarløstir, likamligar skaðar og um frágreiðing barnsins um ávísar hendingar. Eisini kunnu upplýsingar latast um, hvørjar kanningar og hvørji stig myndugleikar og fakfólk meta neyðugar í einstaka málinum, soleiðis at fyriskipanirnar verða samskipaðar, og myndugleikar betur kunnu samstarva um málið.

Upplýsingar, ið kunnu vera viðkomandi at lata víðari, kunnu vera upplýsingar frá videoavhoyringum. T.d. kann vera viðkomandi, at løgreglan greiðir tí, ið veitir kreppuhjálp, frá, hvussu barnið hevur upplivað hendingar. Eisini kann vera viðkomandi at lata kanningarúrslit og úrslit frá viðgerð í heilsuverkinum til tey fyri málið viðkomandi fakfólk. Harumframt kann vera viðkomandi, at tey, ið veita barninum kreppuhjálp, og sum fáa innlit í hendingar og sálarløstir hjá barninum, lata upplýsingar, ið eru viðkomandi fyri hini fakfólkini í málinum.

Heimildin at lata upplýsingar kann nýtast við atliti til at verja barnið, og fyri at veita barninum so eirindasama hjálp og stuðul, ið til ber, og fyri ikki óneyðuga at tyngja barnið. Tað er umráðandi, at barnið ikki aftur og aftur skal greiða frá somu viðurskiftum.

Upplýsingar kunnu latast, uttan at tann, ið upplýsingin viðvíkur, hevur givið samtykki, tá hetta er neyðugt til tess at verja barnið. T.d. í teimum førum, tá illgruni er um, at foreldur, familja ella vinfólk hjá familju fremja ágangin, men tá hesin illgruni enn ikki er staðfestur.

Fyri barnaverndarumsitingina kann tað vera viðkomandi at lata upplýsingar ímillum myndugleikar í byrjanini av einum máli og í teimum førum, tá barnaverndartænastan einans hevur illgruna um ágang ella harðskap. Á hesum stignum kann tað vera trupult at meta um, hvørt grundarlag er fyri at melda málið til løgregluna. Tað er tískil umráðandi, at barnaverndarumsitingin og løgreglan kunnu lata upplýsingar ímillum sín við atliti til at fáa greiðu á, um málið skal meldast til løgregluna.

Í málum, har løgreglan er byrjað upp á kanningararbeiði um kynsligan ágang ella likamligan harðskap, men har greiða enn ikki er fingin á málinum, kann tað vera viðkomandi fyri løgregluna, at upplýsingar verða latnar millum myndugleikar. Í tílíkum førum er tað umráðandi, at løgreglan fráboðar barnaverndartænastum um børn, ið kunnu tørva hjálp og stuðul. Sama er galdandi í málum, har løgreglan einans hevur illgruna um, at barn er fyri ágangi.

Fráboðar løgreglan eisini til barnaverndartænastuna í tílíkum málum, kann hetta føra til, at barnaverndartænasturnar fyrr meta um, hvørt kanning sambært § 45 eigur at setast í verk, undir hesum at lata barnið kanna umvegis Barnahúsið.

At lata upplýsingar millum myndugleikar kann eisini føra við sær, at barnaverndartænasturnar og løgreglan kunnu samskipa, hvørji stig skulu takast í málinum. Við hesum kunnu barnaverndartænasturnar og løgreglan betur samskipa, hvussu sosiala málið kann koyra, samstundis sum løgreglan ger revsirættarligar kanningar í málinum. Barnaverndatænastan hevur ábyrgdina av at veita barninum neyðuga hjálp og stuðul uttan mun til, um ákæra verður reist í málinum.

Upplýsingar, ið kunnu latast víðari, eru upplýsingar um privat viðurskifti hjá barninum, undir hesum upplýsingar um heilsustøðu og sosialar trupulleikar. Eisini kunnu myndugleikarnir lata upplýsingar um persónar, ið eru undir illgruna fyri at hava framt ágang mótvegis barninum.

Í tann mun, at upplýsingar skulu latast millum myndugleikar, ið fella uttan fyri hesa heimildina, skulu hesar upplýsingar framvegis latast sambært reglunum í fyrisitingarlógini og persónsupplýsingarlógini. Í tann mun, at tørvur er á at kanna viðurskifti barnsins vegna ágang ella illgruna um ágang, skulu kanningarnar fremjast umvegis Barnahúsið.

Høvi at lata upplýsingar kann eisini nýtast soleiðis, at myndugleikarnir kunnu fáa fult yvirlit yvir støðu barnsins, og soleiðis at tann hjálpin og stuðulin, ið verður veittur, nøktar tann veruliga tørvin hjá barninum.

Heimildin gevur eisini viðkomandi myndugleikum møguleika at lata privatar upplýsingar, tá tað ikki verður mett gagnligt ella møguligt at biðja um samtykki frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan, og frá barninum, ið er fylt 15 ár.

Tann myndugleikin, ið varðar av Barnahúsinum, eins og hvør myndugleiki sær, ið hevur uppgávur í Barnahúsinum, hava ábyrgd av, at dátutrygdin er í lagi sambært persónsupplýsingarlógini.

***Til § 1, nr. 2***

Heimildin í § 14, stk. 5 er eitt framhald av verandi heimild, ið ásetir, at fakfólk, ið fráboða, skulu hava eina afturboðan um, at barnaverndartænastan hevur móttikið fráboðanina.

Við hesi heimildini skal barnaverndarumsitingin boða fakfólkum frá, um kanning ella fyriskipan er sett í verk.

Afturboðanin frá barnaverndarumsitingini fevnir einans um fakfólk, sum umvegis sítt starv fráboða barnaverndartænastuni. Barnaverndarumsitingin kann ikki boða øðrum m.a. grannum, familju og vinfólki, ið fráboða, frá, um kanning ella fyriskipanir eru settar í verk.

Endamálið við heimildini er at tryggja, at tey fakfólk, ið umvegis sítt starv fráboða barnaverndartænastuni, fáa at vita, um barnaverndartænastan hevur tikið stúran teirra til eftirtektar.

Tað kann vera viðkomandi fyri, hvussu tann, ið fráboðar, skal arbeiða víðari við barninum, eins og tað kann vera viðkomandi í tann mun, at hesin umhugsar at klaga málið grundað á framhaldandi stúran fyri barninum.

Heimildin ásetir ikki freist fyri, nær og hvussu barnaverndartænastan skal afturboða, men til tess at liva upp til endamálið við ásetingini eigur barnaverndarumsitingin at afturboða innan rímiliga tíð.

Um serlig atlit tala fyri tí, kann barnaverndarumsitingin lata vera við at geva tí, ið fráboðar, nakra afturboðan. T.d. um barnaverndarumsitingin metir, at afturboðanin ikki fer at virka fremjandi fyri tær fyriskipanir, ið eru ella skulu setast í verk. Um álit familjunnar á myndugleikarnar er soleiðis háttað, at ein afturboðan fer at darva samstarvinum millum partarnar, ella um eitt nú ósemja er ímillum familjuna og tann, ið fráboðar.

Í framhaldi av § 14, stk. 5 verður í § 14, stk. 6 mælt til, at barnaverndarumsitingin kann kunna fakfólk, ið umvegis sítt starv hava fráboðað, um, hvørjar fyriskipanir eru ella verða settar í verk, og hvussu leingi fyriskipanirnar vara. Henda heimildin kann einans nýtast, um tað verður mett at vera av týðandi týdningi fyri ta hjálp og tann stuðul, ið viðkomandi fráboðari veitir barninum. Heimildin í stk. 6 kann hugsast viðkomandi, tá tann, ið fráboðar umvegis sítt starv, kann vera við til at stuðla undir tær fyriskipanir, ið barnaverndartænastan setir í verk. Hesi kunnu eitt nú vera starvsfólk í barnagørðum, skúlum og heilsufrøðingar.

Fortreytin fyri, at barnaverndarumsitingin kann afturboða, er, at fakfólkið í sínum dagliga starvi kann taka faklig atlit til tær fyriskipanir, ið eru settar í verk barninum og familjuni at frama.

Barnaverndarumsitingin kann einans kunna um, hvør fyriskipan er sett í verk, og hvussu leingi fyriskipanin skal vara. Barnaverndarumsitingin kann ikki kunna um innihaldið í fyriskipanini ella um onnur viðurskifti barnsins. Upplýsingar um onnur viðurskifti enn tey her nevndu, skulu viðgerast sambært vanligum reglum, og merkir hetta í flestu førum, at tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, ella barn, ið er fylt 15 ár, skal geva samtykki til, at privatar upplýsingar verða latnar eitt nú í sambandi við tvørfakligt samstarv millum myndugleikar.

Barnaverndarumsitingin metir í hvørjum einstøkum føri, um tað hevur avgerandi týdning at kunna um fyriskipanir, og um serlig viðurskifti tala ímóti at kunna um, hvørjar fyriskipanir eru settar í verk. Somu atlit, sum nevnd omanfyri undir stk. 5, kunnu gera seg galdandi.

Barnaverndartænastan skal kunna tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, um, at upplýsingar eru latnar.

***Til § 1, nr. 3 og 4***

Mælt verður til, at heitið ”blóðskemd” í § 18, stk. 1 verður broytt til kynsligur ágangur. Blóðskemd merkir kynsligt samband millum nær skyld ella nær svágd. Ásetingin skal ikki einans fevna um kynsligt samband í familjuni, men um allan kynsligan ágang mótvegis børnum.

Eisini verður mælt til at broyta verandi orðing í stk. 1, soleiðis at tað verður nágreinað, at barnaverndartænastan, tá orsøk er til at halda, at barn er fyri kynsligum ágangi ella likamligum harðskapi, uttan samtykki frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan, og barni, ið er fylt 15 ár, kann avgera, at barn skal til hóskandi viðgerð ella kanning.Eisini verður mælt til at nágreina heimildina, soleiðis at tað verður greitt, at talan eisini er um viðgerð og kanningar, ið Barnahúsið fyriskipar.

Heimildin er viðkomandi í teimum førum, tá tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, seta seg ímóti, at barnið verður kannað. Hetta kann hugsast at koma fyri, tá tað eru foreldrini sjálvi, ið hava framt ágangin.

***Til § 1, nr. 5***

Mælt verður til at umorða heimildina í § 45, stk. 8, soleiðis at barnaverndarumsitingini verður álagt at tosa við barnið í sambandi við, at mál verður kannað.

Barnaverndarumsitingin kundi áður avgera at tosa við barnið. Við hesi heimildini verður tað álagt barnaverndarumsitingini at tosa við barnið, um ikki atlitið til barnið talar ímóti hesum.

Endamálið við heimildini er at tryggja, at barnið skjótast til ber verður tikið upp í viðgerð og kanning av egnum máli. Eitt barn kann altíð sýta at tosa við barnaverndarumsitingina.

Tað verður mett umráðandi, at heimildin at tosa við barnið eisini fevnir um at tosa við barnið, uttan at tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, hava givið samtykki til samrøðuna, og uttan at hesi eru hjástødd. Heimildin broytir tó ikki meginregluna um, at upplýsingar í einum máli altíð skulu innheintast í samstarvi við tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan.

Heimildin at tosa við barnið uttan samtykki frá foreldrum kann vera viðkomandi í tí føri, tá illgruni er um, at eitt ella bæði foreldur, ella ein í nær familju fremur ágang mótvegis barninum. Í tílíkum føri talar atlitið til barnið fyri, at foreldur ikki eru hjástødd undir samrøðuni. Tørvur barnsins kemur fram um atlitið til foreldrini.

Barnið hevur rætt til ein hjásitara undir samrøðuni, og skal barnaverndarumsitingin áðrenn samrøðuna kunna barnið um henda rættin. Hjásitarin kann t.d. vera ein lærari, námsfrøðingur ella annar persónur, ið barnið kennir seg tryggan við.

Barnaverndarumsitingin má tó í hvørjum einstøkum føri meta um, hvørt barnsins búning og/ella umstøðurnar í málinum eru soleiðis háttaðar, at hetta talar ímóti at tosa við barnið, t.d. um barnið verður órímiliga kroyst av støðuni. Í tí føri, ella tá barnið ikki ynskir at tosa við barnaverndarumsitingina, eigur barnaverndarumsitingin at ansa eftir, at sjónarmið barnsins kunnu lýsast á annan hátt.

***Til § 1, nr. 6***

Sambært nýggju heimildini í § 45a skal barnaverndarumsitingin í sambandi við fráboðanir um barn, ið er undir fyriskipan sambært barnaverndarlógini,  meta um málið av nýggjum.

Fær barnaverndartænastan nýggja fráboðan, meðan mál verður kannað sambært § 45, skal nýggja fráboðanin takast við í kanningina.

Eftirmetingin av málinum hevur til endamáls at greiða, í hvønn mun tær fyriskipanir, ið eru settar í verk, skulu endurskoðast. Í sambandi við, at málið verður eftirmett, skulu, í tann mun til ber, onnur starvsfólk enn tey, ið upprunaliga hava viðgjørt málið, vera partur av efturmetingini. Tað er umráðandi, at málsviðgerðin í málinum fær neyðuga fakliga sparring, soleiðis at tryggjað verður, at øll viðkomandi sjónarmið í málinum verða lýst og ikki verða mistulkað.

Við tað at ávísar barnaverndarumsitingar ikki hava fleiri starvsfólk í starvi má ein meting gerast í einstøku málunum, hvørt tað er neyðugt at keypa óheft starvsfólk at eftirmeta málini.

Endamálið við heimildini er at tryggja, at barn, ið er undir barnavernd, ikki smokkar burtur ímillum, av tí at fyriskipan longu er sett í verk.

***Til § 1, nr. 7***

Í § 49, stk. 1 verður mælt til at nágreina, at barnaverndartænastan í sambandi við fráboðanir beinanvegin og innan 24 tímar má meta um, hvørt viðurskifti eru, ið kunnu skaða barnsins heilsu og menning, og bráðfeingis fyriskipan tí eigur at vera sett í verk.

Heimildin fevnir í høvuðsheitum um álvarslig mál, har ið barnið kann vera fyri skaða og hevur tørv á bráðfeingis hjálp. Eitt nú um barnið hevur verið fyri kynsligum ágangi ella likamligum harðskapi.

Um barnaverndartænastan ikki metir, at tørvur er á bráðfeingis fyriskipan, verður málið fevnt av vanligu freistunum í § 49.

Barnaverndartænasturnar eiga at meta um málið beinanvegin, men í seinasta lagi innan 24 tímar, eisini sunnu- og halgidagar og kunnu ikki bíða til komandi arbeiðsdag

**Til § 2**

Gildiskomuregla.

**Fylgiskjøl:**
1. **Javntekstur**
2. **Fíggjarmálaráðið**
3. **Politi í Føroyum**
4. **Mentamálaráðið**
5. **Barnaverndarstovan**
6. **Almannaverkið**
7. **Heilsumálaráðið**
8. **Sernám**
9. **Føroya Pedagogfelag**

**10: Kommunusamskipan Føroya**
**11: Føroya Kommunufelag**

Almannamálaráðið, 23. oktober 2013

**Annika Olsen**
landsstýriskvinna

/ Johnhard Klettheyggj